# Starvsfólk til deildina Vernd á Umhvørvisstovuni

**Umhvørvisstovan søkir starvsfólk til deildina Vernd til fjølbroytt og avbjóðandi starv innan umhvørvisøkið at byrja skjótast gjørligt.**

Vit virka fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá virkjum og virksemi, eitt nú ídnaði, aling, skipum og øðrum virksemi á landi og á sjónum. Vit gera uppskot til lógir og kunngerðir á umhvørvisøkinum og luttaka í norðurlendskum og altjóða umhvørvissamstarvi.

## Starvið

Starvið er fjølbroytt og avbjóðandi, og fevnir m.a. um at góðkenna og hava eftirlit við dálkandi virkjum og virksemi, at meta um dálking frá ymiskum virksemi, meta um umhvørvisstøðuna á firðum, meta um óljóð frá virkjum, skipum o.ø., viðgera umhvørvisárinsmetingar, gera uppgerðir og hagtøl.

Talan kann eisini verða um aðrar uppgávur treytað av førleikum og áhuga.

## Førleikar

Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur, umhvørvisverkfrøðingur, lívfrøðingur ella líknandi. Tú ert tvørfaklig(ur), fjølbroytt(ur) og kanst útinna ymiskar uppgávur.

Áhugi og kunnleiki til náttúru og umhvørvi og royndir við fyrisitingarlóg eru fyrimunir.

Tú hevur teldukunnleika á brúkarastigi og dugir væl at samskifta í skrift og talu á føroyskum, norðurlendskum og enskum. Tú hevur koyrikort til bil.

## Setanarviðurskifti

Starvið er fulltíðarstarv at byrja skjótast gjørligt.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya ella annað viðkomandi yrkisfelag. Arbeiðsstaður er Umhvørvisstovan.

Umsókn, saman við prógvum, CV o.ø., skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. mai 2018. Umsóknir kunnu sendast við telduposti til starv@us.fo ella sum bræv.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Suna Petersen, deildarleiðara á Vernd, teldupostur sunip@us.fo, tlf. 342444.